## Kommunufundur á alnótini

Í næsta mánað fáa grønlendskir bygdaráðslimir kring alt landið høvi til at hittast á alnótini til at umrøða kommunupolitikk. Tað er kommunufelagið KANUKOKA, sum stendur aftan fyri til-takið, sum er ein beinleiðis avleiðing av, at fleiri smáar kommunur eru lagdar saman. Svend Møller, ráðgevi hjá kommunu-felagnum, sigur við kringvarpið KNR, at endamálið við skipanini er at menna og varðveita nærdemokratiið, uttan at fólk noyðast at ferðast til fundirnar. Í løtuni verður kannað, hvussu nógvir av teimum 106 bygdaráðslimunum hava egna teldu og atgongd til alnótina.



## Barrosso vil hava Hedegaard

Næsta ár leggur danski ES-kommiserurin, Mariann Fischer Boel, frá sær, og danskir fjølmiðlar hava havt fleiri boð uppá, hvør kann metast sum møguligur avloysari. Men tað eru ikki bara danir, sum hugsa um tann komandi kommiserin. Berlingske Tidende skrivar í dag, at formaðurin í ES-nevndini, Jose Manuel Barroso, vil hava Connie Hedegaard, veðurlags- og orkumálaráðharra til nýggjan kommiser. Frá keldum í Bruxelles hevur blaðið frætt, at Barroso hevur sagt Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharra, at hann vil fegin hava Connie Hedegaard til kommiser í veðurlagsmálum.

# Spent upp á um stevnan bleiv

**Altjóða fíggjarkreppan gjørdi, at fyrireikararnir ikki vóru heilt vísir í, um FaroEXPO varð veruleiki í ár, men endin gjørdist, at fleiri luttakarar eru við í ár enn í fjør**

FAROEXPO
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Fyrireikararnir av FaroEXPO eru sera væl nøgdir við stevnuna, og halda, at hon hevur hepnast ógvuliga væl*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Rannvá Troest er ein av fyrireikarunum til FaroEXPO, og vit spurdu hana, hvussu tilmeldingin hevði verið til ráðstevnuna í ár.

- Hon hevur verið betri enn væntað. Tá vit byrjaðu at arbeiða við ráðstevnuni fyri í ár, so var nógv tos um fíggjarkreppuna, sum herjar um allan heim, og tí hugsaðu vit nógv um, hvørt tað mundi fara at bera til at gera eitt partneriat í ár ella ikki. Men tað vísti seg, at tá avtornaði høvdu tríggjar fleiri fyritøkur meldað til í ár, so vit hava havt ein støðugar vøkstur øll fimm árini, sigur Rannvá Troest.

Hon dylir tó ikki fyri, at málið er at koma upp á eitt stað millum 70 og 100 fyritøkur í framtíðini.

Samlaða talið av luttakarum í ár er 53, og av teimum eru 35 føroyskar og hinar 18 so útlendskar.

-Tað hevur verið eitt sindur av broyting í tilmeldingini í ár. Tað hevur verið ett sindur torførari at fáa tær donsku fyritøkurnar at melda til í ár, sjálvt um tær hava átt største talið av útlendskum fyritøkum og eiga tað enn, sigur Rannvá Troest.

Hon viðgongur, at tað hevur verið truplari í ár at fáa ráðstevnuna av bakkastokki, men hinvegin hava tey so fingið ein nýggjan marknað.

- Tað eru fýra íslendskar fyritøkur við í ár umframt íslendska útflutningsráðið, so tað er spennandi, sigur Rannvá Troest.

Hon hevur eisini sína meting um, hví íslendskar fyritøkur hava valt at verið við á FaroEXPO á fyrsta sinni í ár.

- Tað er uttan iva støðan í Íslandi í løtuni, sum ger tað. Teir royna at finna nýggjar marknaðir og nýggjar samstarvspartnarar. Teir kenna seg tryggjar á føroyska marknaðinum og millum føroyingar sum heild, sigur Rannvá Troest.

### Drúgv fyriskipan

- Ráðstevnan er skipað sum eitt partneriat, á sama hátt sum eitt nú Travel Mart.

Tað gongur fyri seg á tann hátt, at fyritøkurnar gera avtalur um stuttar fundir saman, einar 20 minuttir ella so. Hendan ráðstevnan er kortini eitt sindur breiðari enn til dømis Travel Mart, sigur Rannvá Troest.

Men allar slíkar stevnur krevja drúgva fyrireiking.

- Tað gongur ein vika eftir at ráðstevnan er endað, so halda vit ein eftirmetingarfund í stýrisbólkinum aftan fyri FaroEXPO, sum er samansettur av umboðum fyri Runavíkar kommunu og Eysturoyar Vinnulívsfelag. So verður sett út í kortið, nær næsta stevna skal verða og taka avgerðir um framtíðina, sigur Rannvá Troest.

Tað fyrsta, sum verður farið í holt við, er at fáa stuðlarnar upp á pláss.

- Síðani verður send kunning út til tær fyritøkurnar, sum vit vænta kunnu verða við komandi ár, so arbeiðið við FaroEXPO fer fram alt árið, sigur Rannvá Troest.

Tað er kortini ikki fyrr enn frá apríl mánað og úteftir, at tað veruliga merkist á arbeiðsplássinum, at arbeitt verður við FaroEXPO.

Hetta sum nevnt fimta árið, at Virkisráðgevingin skipar fyri FaroEXPO.

- Tað er jú greitt, at vit sum árini eru gingin eru vorðin betri til at skipa fyri, og tað hevur gingið ótrúliga væl síðani vit byrjaðu. Tað hava næstan ongar broytingar verið í skránni, og tað merkir, at vit eru vorðin betri at seta tingini saman, sigur Rannvá Troest.

# Tit eru okkara einastu vinir

**Icetrade, sum er íslendska útflutningsráðið, er, saman við fýra íslendskum fyritøkum, við á FaroEXPO á fyrsta sinni**

FAROEXPO
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Íslendingar eru við á FaroEXPO í ár, og stjórnin hevur eisini sent umboð fyri útflutningsráðið við til Føroya.

- Mín uppgáva er at tosa við føroyskar fyritøkur fyri at vita, um eg kann hjálpa til við handli báðar vegi millum Føroyar og Ísland. Tú kanst siga, at Føroyar í løtuni eru okkara einastu vinir í heiminum, og vit vilja fegin hava gott samband við øll tykkum og við fyritøkur, sum hava handlað við íslendskar fyritøkur, sigur Elsa Einarsdóttir frá Icetrade.

Hetta er sum nevnt aðrastaðni fyrstu ferð, at íslendskar fyritøkur eru við til FaroEXPO.

- Eg havi við mær fýra íslendskar fyritøkur, og tær eru innan ymisk virkisøkir, vindeygu, hurðar, marineteknikk og so er ein fyritøka, sum áður hevur handlað her í Føroyum við olju, smyrjiolju og líknandi, sigur Elsa Einarsdóttir.

Hon heldur, at tað verður spennandi at síggja, hvat kann koma burtur úr hesari ráðstevnuni fyri íslendsku fyritøkurnar.

Hon ætlar at nýta royndirnar frá í ár at arbeiða fyri, at fáa fleiri íslendeskar fyritøkur at koma við á FaroEXPO komandi ár.

### Menna ferðavinnu

Íslendingar eru í løtuni í ferð við at umleggja útflutningsráðið (Icetrade) til at spenna víðari.

- Ja, Altingið hevur viðgjørt málið um at broyta Icetrade soleiðis sum tað sær út í løtuni, so at marknaðarføring av ferðavinnu eisini kemur at liggja undir útflutningsráðnum. Tá fer virkisøkið hjá okkum at umfata annað og meira enn bara útflugning og innflutning, sigur Elsa Einarsdóttir.

Ferðavinna er ein stórur partur av íslendsku inntøkunum, og tí má stórur dentur leggjast á at draga enn fleiri útlendingar til Íslands.

- Roknað verður við 500.000 ferðafólkum í ár, og tað er eini 10-12% fleiri enn framman undan. Tey koma fyri at síggja landið, sjálvandi, men eisini fyri at handla, tí íslendska krónan er so lág fyri tíðina, sigur Elsa Einarsdóttir.

Tá vit tosaðu við umboðið fyri íslendska útflutningsráðið var stevnan ikki rættiliga gomul, men kortini lat hon væl at.

- Tað sær út til at virka ógvuliga væl. Teir fundir, sum tey hava fyriskipað, eru heilt framúr. Hetta virkar munandi betri enn ein messa, har tú situr í tínum bási og bíðar eftir fólki. Takk skulu tey hava fyri at skipa fyri einari so góðaru ráðstevnu, sigur Elsa Einarsdóttir, umboð fyri Icetrade.



*Elsa Einarsdóttir er við á FaroEXPO, umboðandi Icetrade*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*